Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Ingilín D. Strøm, løgtingsmaður

Svarari: Magnus Rasmussen, landsstýrismaður í umhvørvis- og vinnumálum

Evni: Biofiltur í havumhvørvinum

Spurningar:

1. Hvat ætlar landsstýrismaðurin at gera, so forðað verður fyri, at biofiltur dálka havumhvørvið og verða funnin í havhesti?
2. Er talan um brot á løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd í ítøkiliga førinum, har biofiltur eru funnin í havumhvørvinum og í havhesti?
3. Í hvørjum økjum í Føroyum eru biofiltrini funnin?
4. Ætlar landsstýrismaðurin at brúka heimildina í lógini at seta forboð fyri dálkandi virkseminum í økjunum?

Viðmerkingar:
Ógvusliga myndin av havhestinum við 27 biofiltrum í maganum gevur greitt prógv um, at havumhvørvið er dálkað við biofiltrum. Myndin ferðast víða á sosialu miðlunum og hevur verið frammi í fjølmiðlunum eisini. Ongar av fyritøkunum, sum hava virksemi í økjunum, hava givið til kennar, at tær eru atvoldin til dálkingina.

Løgtingið hevur samtykt eina umhvørvisverndarlóg, ið ásetur, hvat gerast skal í slíkum førum.

Landsstýrismaðurin hevur heimild at seta ymiskt í verk, alt eftir brotinum. Tí verður spurningurin settur.

Á Løgtingi, 9. september 2022

Ingilín D. Strøm